# Álit

# í

**løgtingsmál nr. 126/2013: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan**

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur lagt málið fram tann 7. mars 2014, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2014 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 25. mars, 1., 3., 29. apríl, 1., 2., og 5. mai 2014.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Johan Dahl, landsstýrismann í vinnumálum.

Ein samd nevnd tekur undir við at broyta gildiskomuna soleiðis, at tey, sum í dag eru í barnsburðarfarloyvi og ikki hava fingið útgoldið allan tann barsilspening, ið tey hava rætt til sambært kapittul III í lógini, eisini verða fevnd av lógini. Umframt hetta, verður ein teknisk broyting gjørd.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) Í § 1, nr. 4 verður í § 9, stk. 2 "stk. 7 og 8 og 7" broytt til: "stk. 7, 8 og 9".
2) § 2, stk. 3 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 3.* Henda løgtingslóg er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum henda løgtingslóg kemur í gildi, ella seinni, og fyri foreldur, sum í dag eru í skipanini og sum ikki hava fingið útgoldið allan tann barsilspening, sum tey hava rætt til sbrt. kapittul III í lógini."

Viðmerkingar
Broyting til nr. 1: Teknisk broyting, av tí at stk. 9 ikki varð nevnt, men stk. 7 varð nevnt tvær ferðir.
Broyting til nr. 2: Gildiskoman verður broytt til, at foreldur, sum í dag eru í skipanini og ikki hava fingið útgoldið allan tann barsilspening, sum tey hava rætt til sbrt. kapittul III, verða eisini fevnd av nýggju reglunum.

Undir viðgerðini hevur nevndin hereftir býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Alfred Olsen, Bjarni Djurholm, Hanus Samró og Janus Rein) fegnast um, at Barsilsskipanin økist við 4 vikum, frá 34 upp í 38 vikur, uttan at gjaldið til Barsilsskipanin verður hækkað, og at vit við hesum koma nærri tí málsetningi, ið samgongan hevur sett sær fyri, at okkara barsilsskipanin skal vera komin uppá eitt ár innan rímiliga tíð.

Meirilutin er ikki samdur í viðmerkingunum til grein 9, stk. 3 um, at brúkar pápin ikki sína kvotu av barnsburðartíðini, so kann hann lata mammuni tær 2 vikurnar av teimum 6 vikunum, meðan tær 4 vikurnar sum tá eru eftir, fella burtur. Meirilutin er av tí áskoðan, at hetta fyrst og fremst gongur út yvir barnið, við tað at hetta í ringasta føri viðførir, at barnið ikki fær loyvi til at fáa umsorganina av mammuni í 4 vikur av tí samlaðu barsilsstíðini hjá foreldrunum. Tískil verður gjørd tann broyting,

at 2 vikur hjá pápanum verða fluttar til felags kvotuna.

Meirilutin ynskir, at bæði foreldrini so vítt sum gjørligt eru um barnið, og mælir tískil til hesa broyting.

**Meirilutin** (Alfred Olsen, Bjarni Djurholm, Hanus Samró og Janus Rein) setir harumframt soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) Í § 1, nr. 1 verður í § 1, stk. 2, "6" broytt til: "4"
2) Í § 1, nr. 3 verður í § 9, stk. 1, "32" broytt til: "34"
3) Í § 1, nr. 4 verður í § 9, stk. 2, "18" broytt til: "20"
4) Í § 1, nr. 5 verður § 9, stk. 3 orðað soleiðis: " Faðirin at barninum hevur rætt til barsilspening í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 38 vikurnar eftir barnsburð."

Viðmerkingar
Broytingin hevur við sær, at faðirin at barninum fær rætt til barsilspening í 4 vikur, í mun til 6 vikur, sum ásett í lógaruppskotinum. Faðirin fær við hesum somu rættarstøðu, sum hann hevur í dag í galdandi lóg. Ístaðin verða tær 2 vikurnar lagdar í felagskvotuna hjá foreldrunum, har foreldrini kunnu velja, hvør tekur farloyvið.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen, Aksel V. Johannesen og Kári P. Højgaard) tekur undir við at leingja barnsburðarfarloyvið, men ikki við at 15% av útgjaldinum komandi árini verður tikið av útgjaldinum til eftirlønargjald.

Víst verður á, at seinastu 8 árini hevur landið tikið minst 64,4 milliónir krónur ov nógv inn í barsilsgjaldi, sum er oman fyri 8 milliónir krónur í miðal ov nógv kravt inn árliga. Sjálvandi eiga hesir pengar at verða nýttir til at gera eina betri barsilsskipan.

Tað var í 2006, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum av álvara tóku við fullu gjaldsábyrgdini av Barsilsskipanini, við, at inngjaldið varð sett til 0,62%, sum bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar gjalda av øllum lønum.

Júst tí, at yvirskot var, valdi CHE-samgongan í 2008 alt fyri eitt at leingja arsilsskipanina við 8 vikum, umframt at styrkja rættindini hjá pápanum til barsilskvotu, og gera hesa eitt vet meira smidliga. Hetta varð gjørt við tí greiða máli, at lønta barsilsfarloyvistíðin yvir fá ár skuldi leingjast upp í eitt ár. Allir flokkar stuðlaðu hesum.

Tíverri er ein orsøk til stóra yvirskotið í barsilsskipanini, at færri børn verða fødd. Fyri 20 árum síðani vórðu nærri 950 børn fødd um árið, ímeðan talið av føddum børnum støðugt hevur verið minkandi og nú liggur um 600.

Ein góð og smidlig barsilsskipan er avgerandi táttur, tá ræður um at eggja familjum at virka, liva og eiga síni børn heima í Føroyum. Oftani er tað har, sum børnini koma í verðina, at familjurnar festa

røtur. Neyðugt er tí, at okkara barsilsskipan áhaldandi gerst betri og meira kappingarfør við líknandi skipanir í okkara grannalondum.

Tí hevur Tjóðveldi bæði í 2012 og aftur í 2013 lagt fyri Løgtingið eitt uppskot um at bøta munandi um barsilsskipanina:

- Lønta barnsburðarfarloyvið verður longt við 8 vikum, úr 34 upp í í 42 vikur.
- Av longda farloyvinum verða 4 vikur markaðar pápanum, sum við hesum fær 6 vikur, sum hann eigur einsamallur saman við barninum.
- Mamman hevur framvegis 14 vikur, sum eru markaðar henni, restin er felagskvota.
- Foreldrini gera sjálvi av, hvussu tey sínámillum býta restina av løntu barsilskvotuni.
- Partur av farloyvinum (aftaná 14 vikur) kann skipast sum barsilskvota yvir tvey ár.
- Brúk av barsilskvotu aftaná 52 vikur krevur avtalu við arbeiðsgevara.
- Tvíbura- og tríburaforeldur fáa 4 vikur eyka fyri hvørt barnið.
- Støk foreldur fáa fulla kvotu – 42 vikur við løn.
- Fyri foreldur, sum ættleiða, verður skipanin longd samsvarandi.
- Lesandi fáa møguleikan at gerast partar av barsilsskipanini.
- Serstøk skipan verður gjørd fyri børn, sum eru fødd prematur.

Viðgerð av hesum máli seinastu árini hevur staðfest, hvussu stór ynskini og tørvurin er á at útbyggja barsilsskipanina.

Minnilutin fegnast um, at landsstýrismaðurin loksins er komin við einum uppskoti um at leingja barnsburðarfarloyvið við fýra vikum. Tað er uppá tíðina, tí tað hava gingið 7 ár, uttan at skipanin er broytt, hóast so stórt yvirskot hevur verið í henni.

Uppskotið hjá landsstýrismanninum fevnir eisini um, at eftirlønargjaldið verður tikið beinleiðis av barsilsgjaldinum, byrjandi við 1% og stigvíst vaksandi til 15%. Hetta er minnilutin hart ímóti. Tað kann als ikki góðtakast, at tey, sum fara í barnsburðarfarloyvi komandi árini, skulu uppliva, at útgjaldið minkar við einum prosenti árliga til heili 15% lægri útgjald um 15 ár. Hesum mælir minnilutin staðiliga frá. Sjálvandi eigur eftirlønin at verða løgd omaná útgjaldið, eins og gjørt er við aðrar lønir. Útgjaldið er eitt endurgjald fyri lønarmiss, og eigur markið fyri útgjaldi tí heldur at hækka, enn at lækka.

Lækkingin í útgjaldinum kemur eisini at raka lægstu inntøkubólkarnar harðast, tí tímalønt hava frammanundan eitt rættiliga lágt útrokningargrundarlag,

Heldur eigur landsstýrismaðurin í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum at finna eina loysn á spurninginum um at gera barsilsgjaldið eftirlønargevandi. Eitt nú hevði verið snilt at gjørt eitt samanlagt arbeiðsmarknaðargjald. Havandi í huga, at landið hevur tikið oman fyri 64 milliónir krónur ov nógv inn í barsilsgjaldi, hevði verið rímiligt, at hesir pengar blivu settir í ein barsilsgrunn ella arbeiðsmarknaðargrunn og nýttir til eftirlønargjald.

Politiskt er neyðugt at seta øll segl til at eggja ungum familjum at byggja familju her heima. Tí er fremsta raðfesting at leingja barnburðarfarloyvið upp í eitt ár. Samstundis er neyðugt at tryggja møguleikan hjá báðum foreldrum at vera um børn síni, og tí eigur víðkanin at skipanini at verða býtt ímillum mammu og pápa.

**Minnilutin** (Aksel v. Johannesen, Bjørt Samuelsen og Kári P. Højgaard ) setir harafturat fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 1, nr. 12 verður strikað.

Viðmerkingar
Eftirlønarásetingin verður strikað.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 5. mai 2014**

| | | |
|---|---|---|
| Alfred Olsen<br>formaður | Bjørt Samuelsen<br>næstformaður | Kári P. Højgaard |
| Aksel V. Johannesen | Hanus Samró | Bjarni Djurholm |
| | Janus Rein | |